TELDUBRÆVID

Fra: Turið Mørkøre
Dato: 14.01.01
Til: post@sosialurin.fo
Emne: VIKUSKIFTI

Jóladøgverðin

Oslo hýsir umleið eini hálvari millión íbúgvum, men av teimum eru tað sera fá sum kenna seg sum oslobúgvar. Tey, flestu hava anir úr øðrum heraðshornum í Noregi, og jóladøgverðin er sum regul tann ið varð borðreiddur har mamman, pápin ella langomman vaks upp. Tey, ið hava anir á Vesturlandinum, eta ”pinnekjøtt”, meðan tey, ið hava anir í innlandinum eta ”ribbe”. Pinnekjøtt er seyðakjøt sum er roykt og saltað, meðan ribbe er rivjasteik. Harvið sigur tann rætturin, ið verður borðreiddur um jólini, nógv um røturnar hjá viðkomandi, og tað er ikki óvanligt, at klandur kemur í millum hjún, sum hava røtur ymsastaðir í landinum, tí tey ikki kunnu einast um jóladøgverðan.

Flestu norskar konur leggja stóran dent á køkubaking undan jólum. Gamalt var, at hava sjey ymisk sløg av smákøkum at borreiða við, og eisini í dag er tað vanligt, at kvinnur meta hvørja aðra eftir hvussu nógv ymisk sløg av smákøkum tær hava bakað til jóla. Eins og í Føroyum eru siropskøkur og kleynur fastir táttur í køkuboksunum um jólini. Munurin er, at norskar kleynur ikki hava ”sløyfur”, men eru ringar, sum ofta verða etnar heitar saman við súltutøyi, og siropskøkurnar hava ikki mandlu í miðjuni.

Ikki yvirraskandi spyrja norðmenn ofta: ”Hva spiser dere julaften på Færøyene ?” Og eg má viðganga at mær dámar stak illa at svara. ”And?” spyrja norðmenn undrandi. ”Er det så mange ender på Færøyene, da?” Neeii, ikki so grúuliga nógvar, kanska líka nógvar gæs. Plagi eg at siga. Og so skundi eg mær at fortelja, at onkur etur ræstkjøt jólaaftan og tað er sera vanligt at eta ræstkjøt 1. jóladag. At tað er fult av seyði í Føroyum, at føroyingar eta NÓGV seyðakjøt, hvat ”Hjallar” eru fyri nakað, at ræstkjøt smakkar forferdiliga væl, at hesin rætturin er serføroyskur osfr. Men, norðmenn vilja vita meir um dunnuna. ”Hvorfor spiser dere and når dere er så gla i sauekjøtt, da?”. Og ”Hvor hvor får dere alle disse endene fra, da?”. Júu. Tjaa. Fortelji, at dunnudøgverðin allarhelst er ein danskur jólagávuarvur, og at tað er vanligt at eta aldar danskar dunnur. Men, at dunnurnar eisini kunnu koma aðrastaðni frá. Til dømis so ótu vit svenskar dunnur síðst eg var í Føroyum um jólini, tí tær donsku vóru so fullar í salmonellu. ”Hmmm” siga norðmenn. ”Interessant”. ”Spiser din familie ræstankjøt på 1. juledag, da?” Neeiii. Sigi eg so. ”Danska fleskasteik !” Men, so skundi eg mær at siga vit plaga at eta ræstkjøt annan jóladag.

Nei, tann føroyski jóladøgverðin sigur kanska ikki so nógv um okkara identitet. Ella hvussu ?

Hvat hevði man gjørt í Føroyum

Tað var triði jóladagur, gerandisdagur og tómt í køliskápinum. Eftir køini til kassan í handlinum at døma, vóru tað fleiri sum høvdu tømt matgoymslurnar um jólini. Eg bíðaði eitt langt og annað breitt eftir at koma framat. Hugdi í handlivognarnar hjá teimum frammanfyri, og royndi at rokna út, hvussu langa tíð tað fór taka áðrenn eg kom frammat. Meðan eg stóð og bíðaði, leitaðu tankarnir út í bilin har børnini uppá 7 og 9 ár sótu. Av erfaring visti eg, at um eg ikki skjótt kom framat, so var vandi fyri samanbresti og tannagrísli yvirhangandi. Aftanfyri meg stóð ein floksvinur hjá dóttur míni, sum eitur Ali. Ali er hálvt norskur og hálvt libanesiskur. Ein lívligur drongur, sum plagar at fáa skyldina fyri óargagerðir í flokkinum. Pápi hansara var longu komin framat, og var í ferð við at pakka vørurnar niður í posar. Hann nikkaði stutt til mín, áðrenn hann fór út. Ali fortaldi, hvat hann hevði gjørt um jólini, at hann hevði fingið eitt kavabretti í jólagávu osv. Tá eg hevði goldið fyri vørurnar, var tað Alisa túrur. Hann hevði ein mjólkapakka í hondini, og spurdi pent kassadámuna um hann kundi sleppa at skifta hann um til eitt annað slag av mjólk. Í stundini kom ein onnur krambakvinna kryssandi millum kundarnar og fortaldi Ali við klárari, strangari rødd at hon longu hevði sagt honum, at hann ikki slapp at býta mjólkapakkan um við ein annan, tí at síðsti søludagur fyri pakkan, hann hevði, var 1. jóladagur, og at mjólkin harvið var gomul. So bað hon Ali skúgva sær út úr handlinum.

Tá eg kom út í bilin fortaldi dótturin, at hon sá Ali koma rennandi út úr handlinum.

Eg gjørdi onki. Hvat hevði man gjørt um hetta hendi í Føroyum?

Rekruttering til fiskivinnuna

Í mínum arbeiði eri eg av og á úti á virkjum, sum virka laks og hvítan fisk, og tað kemur fyri at bara stjórin er norðmaður, meðan fólkið ið arbeiða fiskin koma aðrastaðir frá. Ofta eru svenskarar, polakkar ella portugisar tey, ið arbeiða fiskin. Hesi arbeiðsfólkini kunnu saktans vera dugnalig, men tað er ein trupulleiki, at planleggjað arbeiði frameftir, tí arbeiðsfólkið í so stóran mun bara arbeiða á virkjunum í styttri tíðarskeið.

Men, í Noregi er rekrutteringin av arbeiðsfólki til fiskivinnuna ein trupulleiki sum nú verður tikin í álvara. Var á eini ráðstevnu í Tróndheimi við heitinum ”Fisk 2000” fyri einum góðum ári síðani. 700 fólk luttóku á rástevnuni sum kong Harald setti... var Kongur í Noregi er rekruttering til fiskivinnuna trupulleikin við ongin norðmaður er ímillum arbeiðsfólki.

Viktoria Drotning

Viktoria Drotning og Disraeli forsætisráðharri

Birgir Kruse

Mánadagin eru hundrað ár liðin síðani bretska Viktoria drotning andaðist 81 ára gomul. Henda tiltikna bretska drotningin andaðist á Osborn slottinum á oynni Wight. Tá hevði hon rátt fyri borgum – og ikki minst altjóða siðaarvi – í 63 ár. Undir Viktoriu gjørdist Stórabretland heimsveldi, sum hevði ræði á fjórðaparti av Heiminum.

Í Evropa fevndi vald hennara um Stóra Bretland, Írland, Gibraltar, Malta og Kypern. Í Afrika taldust ikki færri enn tólv lond, í Asia fýra – teirra millum India – í Norðuramerika Kanada, Bahama- og Bermudaoyggjar, í Miðamerika Jamaika og Honduras og í Suðuramerika landið Guyana. Avstralska heimspartin átti Bretland so at siga allan um hetta mundið; Avstralia, Nýsæ-land og Nýguinea. Afturat hesum kemur alt havøkið og allar tær mongu oyggjarnar á heimsins høvum.

Tað var bretski forsætisráðharrin Benjamin Disraeli, sum í 1877 gav Viktoriu drotning heitið keisarinna av Indiu.

Viktoria drotning hevði stóra ávirkan á samtíðina. Av meiri tímiligum slagi kann nevnast, at bretska útflutningsvirðið øktist hálvu fimtu ferð og at innlendska jarnbreytakervið tíggjufaldaðist í hennara tíð.

Eftir at hon doyði, varð blómandi bretska borgarligheitin í hesum tíðarskeiði nevnd “viktoriansk”. Viktoria Dotning varð fødd 24. mai 1819. Tá hon doyði, tók elsti sonurin við trónuni undir navninum Edvard VII. Sum krúnprinsur var hann alt annað enn “viktorianskur”.

Brad Pitt millum bretskar sigoynarar í filminum ”Snatch”

Pitt to the Brits

Birgir Kruse

”Snatch” siga tey við enskt talandi hundar. Júst sum í filminum við sama navni, sum beint nú gongur í Havnar Bio. Ein frálíkur leygarkvøldsfilmur. Eitt ekkó av ”Fight Club” og amerikansku ”Pulp Fiction”-traditiónini, bretskum gangsterfilmum sum ”Mona Lisa” og ”Get Carter” og í løtum sanniliga eisini ”Olsen Bandanum” og teirra pástandi um, at brotsverk aldri lønar seg. Og tó. Hevur tú hund, so kann mangt henda. Serliga í undirverðini, har mong vinna øðrum neisir. Eins nógvar neisir, og orðið ”Snatch” kann merkja.

”Snatch” er leikandi skemt, men við filmsaktuellum bráddi, sett í karm av framúr frásøgusnildi, í orðum eins og myndum. Bretski Guy Ritchie, sum nýliga hevur verið til altars við Madonnu, er leikstjórin. Kann henda hann gerst ein bretskur Tarantino. Høvuðsleiklutin hevur Brad Pitt sum sigoynari og slagsbróður. Rætt sum í ”Fight Club”. Men álvarsami bráddurin í tí filminum, er her broyttur til ertandi skemt. Filmurin er ein sonn frægd, ið fær teg at læða, sum aldri áður.

Leikur fer fram í undirverðini báðu megin Atlantshav. Í New York og í London.

Fleiri filmar eru, ið hava minnisríkar partar. ”Taxi Driver” við spegils-spurninginum hjá De Niro ”Are you talkin’ to me?”, harðrendi løgreglumaðurin ”Dirty Harry” við revolvara-ynskinum ”Make my day” og Gene Hackman í ”French Connection” við ertandi spurninginum ”Ever been to Poughkeepsie?” og ikki minst minnisríku biljagstranini í sama filmi.

Í filminum ”Snatch” man flogferðin um Atlantshav fara í søguna sum ein hin skjótasta og mest beinrakna. Nærmast ikonografisk. Hetta er postmodernistiskt myndamál, tá ið tað er sum best. Sprottið úr dagsins visuella Mekka - musikkvideo og sjónvarpslýsingum. Vinklar og rútma, samantvinnaðar søgur, nútíð, fortíð og framtíð, og ein dialogur, ið springur sum neistar, munn av munni. Sum oftast, í hvussu er.”I’m not in Rome, I’m in a hurry” er ein setningur, sum lýsir málsliga logikkin. Stuttligt og altíð leikandi. 16 ár er aldursmarkið, ásett av Filmseftirlitinum.

Í durinum varnist eg, at framhaldsfilmur Hannibals kemur í Havnar Bio um ein mánað, hin 23. februar. Tá bróta tey tøgn lambsins og vísa ”Hannibal; Break the Silence” við Anthony Hopkins. Væl í gangist!

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir tveimum pedagogum til Býlingshúsið undir Fjalli.

Størvini
Talan er um eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna, í barnagarðsstovu, við 20 børnum og eitt pedagogstarv 30 tímar um vikuna á vøggustovu við 12 børnum.

Stovnslýsing
Í Býlingshúsinum undir Fjalli ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðstovum við 20 børnum og ein vøggustova við 12 børnum.

Karmarnir eru góðir, og økið rundan um stovnin er barnavinarligt og stutt er burtur í haga.

Vit ynskja
at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett tann 1. mars 2001 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Katrina Joensen, leiðara, tlf. 31 46 65, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjallsgøta 25, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. februar 2001.

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Avgreiðslufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir avgreiðslufólki til Snarskivuna.

Starvið
Avgreiðslufólkið kemur at taka sær av telefonumstilling burturav.

Starvið verður hálvtíðarstarv.

Meir fæst at vita
um starvið við at venda sær til Snarskivuna, tlf. 315160.

Umsóknir
skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. februar 2001. Viðmerk á umsóknina "Avgreiðslufólk".

S N A R S K I V A N

Bilur við skaða til sølu

Merki: Mazda 323 2.0 diesel, 3 hurðar H/B
Árg.: 2000
KM.: 3.539
Lakk: Myrkagrønt met.
Eyka útgerð: Spoylarasett, tokulyktir og píkadekk

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Saltangará
Tlf. 448077
at hitta millum kl. 09.00–11.00

Bilur við skaða til sølu

Merki: Mazda 323 1.5 LX Sedan
Árg.: 1997
KM.: 82.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast hjá Berg Motors, Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 345727 – 214166
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 13.00–15.00

Bilur við skaða til sølu

Merki: Toyota Corolla 2.0 Diesel, 4 hurðar Sedan
Árg.: des.1999
KM.: 23.899
Eyka útgerð: Sportsfelgur, radio v/avsp.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Deildin á Saltangará
Tlf. nr. 448190
at hitta millum kl. 09.00–11.00

KVASIR

Skeið í projektstýring

2-daga grundskeið í

mán 12-02-2001 . týs 13-02-2001
kl. 08.30-15.30
Sera hóskandi til sjálvlærd
- ring og hoyr meira.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
TLF. 320204
http://kvasir.farodane.fo

Farodane 01-01

Søkt verður eftir
Góðskuleiðara/innkeypara
at byrja 1. mars ella skjótast tilber

Starvslýsing:
- at viðlíkahalda og menna verandi góðskukervi (ISO 9002)
- at innføra "HUT" skipan (heilsu, umhvørvi, trygd)
- at standa fyri øllum innkeypi av eykalutum
- at skipa og halda eykalutagoymsluna
- at menna og røkja skrásetingarskipan til viðlíkahald av aktivum felagsins

Vit vænta:
- at tú kanst starvast sjálvstøðugt
- at tú hevur hollar royndir við EDV
- at tú hevur kunnleika til góðskuskipanir (ikki ein treyt)
- at tú hevur kunnleika til innkeyp (ikki ein treyt)
- at tú hevur kunnleika til goymslustýring (ikki ein treyt)
- at tú dugir enskt
- at tú ert fyrikomandi og hevur góð samstarvsevnir

Nærri upplýsingar um starvið og umsóknarblað, fæst við at venda sær til skrivstovuna, tel 441900.

Pf. Heri Thomsen er ein av leiðandi flutningsfyritøkunum í landinum, serstakliga tá tað snýr seg um flutning av fiski, bingjum og alifóðri. Felagið hevur 18 lastbilar/trailarar, 14 leguvognar, 6 gaffiltrukkar og 2 farmaskip, lastvognsverkstað og vørugoymslu (pakkhús). Í dag starvast 35 fólk hjá fyritøkuni, væntandi fer starvsfólkatalið uppá 45 í 2001. Í 1999 fingu vit sum teir fyrstu í Føroyum ISO 9002 góðkenning.

Heri Thomsen Transport Service
TRANSPORT FO-510 Gøtu • Føroyar • Tlf. 441047 • Fax 441866

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA